


# Hvíldarheim vitjað hvíldarheim

**Ferðafrásøgn hjá starvsfólkunum á íslendskum ellisheiminum JAÐAR í Ólavsvík**

Tann 8. august fór ein bólkur við 22 fólkum úr Snæfellsbær í Íslandi ein túr til Føroya. Hetta vóru 11 starvsfelagar av hvíldarheiminum Jaðri og makar teirra.

Hetta var fyrsta ferðin síðani hvíldarheimið Jarða lat upp, at starvsfólkini hava sligið seg saman og eru farin út um landamørkini saman.

Flogið varð úr Reykjavík ein fríggjadag í august 2008 til Vágar.

Leiðin varð løgd til Streymoynna, Tórshavnar, m.a. gjøgnum nakrar tunlar, sum nógvir eru av í Føroyum. Gist varð á vallarheimimum Undir Fjalli.

Leygardagurin var stuttligur og skráin fjølbroytt. Fyrst fóru vit til Hvalvíkar. Her sóu vit ellisheimið Á Mørkini. Væl var tikið ímóti okkum, og tað var eitt av starvsfólkunum, Jónli, sum vísti okkum runt í húsinum. Hetta heim er bert tvey ára gamalt, bygt í einari hædd og er til 32 búfólk. Heimið er skipað í fýra partar, har átta búgva í hvørjum. Eitt kamar/íbúð er í hvørjum parti, har ein persónur kann búgva seks vikur í senn. Ì hvørjum parti er eisini ein lítil køkur, har ein kann baka og gera sær kaffi og fáa góðan anga út um húsið. Maturin verður gjørdur í størra køkinum og verður síðani borin út á allar partarnar av húsinum. Hendan dagin luktaði húsið av røstum fiski. Tað var deiligt at verða har og eftir prát við bæði starvs- og búfólk hildu vit fram við ferðini.

Nú gekk leiðin yvir brúnna um Atlantshavið og komið var til Eysturoy. Farið var til Glyvrar til laksaalis- og framleiðslufyritøkuna Bakkafost. Fiskismiðjan Bylgja í Ólafsvík hevur millum onnur samarbeitt við hesa fyritøku. Ferðalagið fekk stutta kunning frá eigara og stjóranum á fyritøkuni, Regin Jacobsen og gingu síðani ígjøgnum har, sum framleiðslan fer fram, men tey høvdu summerferiu, ímeðan vit vóru har. Í framleiðsluhølinum vóru millum annað stórar og stásiligar maskinur, sum kryvja og gera arbeiði fyri 16-18 fólk. Sum vit nú skilja, so skal fyritøkan nú á skrásetingina á virðisbræva-marknaðinum og leggjast saman við Vestlax.

## Summarfestival

Eftir góða móttøku gekk leiðin til Klaksvíkar. Her var Summarfestivalur.

Nógvur matur og øl til sølu í teltum og tónleikaraframførsla á stórum pallum á bønum. Eftir umleið tveir tímar í Klaksvík gekk leiðin aftur til Tórshavnar og fór allur bólkurin at eta á kinesiskari matstovu um kvøldið.

Sunnudagurin kom við toku og regni, sum er nógv av í Føroyum. Nú var farið til Vestmanna, vinarbý Ólavíks. Ì Vestmanna fóru vit á matstovuna Fjørðukrónna. Borgarstjórin í Vestmanna tók ímóti okkum og vísti okkum modellið av nýggja ellisheiminum, sum verður bygt í Vestmanna. Hetta heimið fer at húsa 24 búfólkum og verður skipað líka sum tað vit sóu í Hvalvík. Ikki er avgjørt enn nær farið verður í gongd við at byggja hetta heim, tí enn er ikki peningur fingin til hesa verkætlan. Inga, fyristøðukvinna á ´Jaðri´ gav borgarstjóranum tekningar av framtíðarætlanum hjá ´Jaðri´. Eftir góðan mat fór bólkurin á ein 2-tímar langan bátatúr, siglt var undir Vestmannabjørgini. Siglt varð sera tætt við bergini og innímillum fóru vit eisini inn í okkurt av bjørgunum, sera fantastisk sjón. Bjørgini eru summastaðni um 600-700 metur høg og á rókunum sóust seyðir á beiti. Teir verða heintaðir um heystið og verða heysaðir niður í bátar, og sum frásøgumaðurin á bátinum segði »then we kill them and eat them«.

Hvat gera tey ikki her sum vit ikki gera heima í Íslandi? Hetta var í allar mátar ein frálík ferð og vísti á líkheitirnar hjá okkum. Bussførarin, Øssur úr Vestmanna koyrdi okkum runt í bygdini og vísti okkum ymiskt. Síðani gekk leiðin til Tórshavnar aftur, við stuttum steðgi í Kvívík. Í Kvívík hittu vit kvívíkingin Sámal, sum kendi ein í ferðaliðnum hjá okkum. Sámal var í Ólafsvík í fleiri ár frá 1954. Hann sigur seg hava nógv góð minnir úr Ólafsvík og er hann komin at kenna fleiri av bygdafólkunum í Ólavsvík. Um kvøldið var allir bólkurin, saman við føroyingum á vallarheiminum, har sungið var bæði á føroyskum og íslendskum. Mánadagin hvíldi bólkurin seg í Tórshavn. Farið var oman í miðbýin, hugt varð í handlar, summi fóru út í Tinganes og sóu gomlu vøkru húsini har.

Eftir døgverða var farið at vitja á eldrasambýlið Tjarnagarður. Har tók forkvinnan Hensia ímóti okkum. Tjarnagarður hoyrdi fyrr til danska herin, sum nú er broytt til at verða eitt ellisheim. Á hesum heimi eru 44 búfólk, harav 10 á dagdeildini og 34 á tveimum øðrum deildum. Runt um í húsinum vóru djór í búrum, fuglar, og eisini rann ein hundur har, sum eitt av búfólknum átti. Eftir hesa góðu vitjan fóru vit aftur til gongu oman í býin. Nøkur av okkum fóru millum annað í Norðurlandahúsið. Restin samdist um at fara ein túr oman á Fútastovuna í Tinganesi, har vit hittu Eyð Guðnason, íslendska konsulin í Føroyum. Her høvdu vit góða tíð og fortaldi Eiður okkum um samskiftið millum Føroyar og Ísland. Sigast má til stuttleika, at nøkur av okkum, gingu runt í grannalagnum og runnu okkum inn í løgmannin í Føroyum, sum gekk ímillum husini har og royndi at stápla eina nýggja samgongu uppá beinini, tí løgtingið hevði mist meirilutan orsakað av einum tunli. Eftir henda deiliga dag fóru vit út at eta. Ymiskt gott var á borðinum t.d Steinbítur, skøta, neytakjøt, lambskjøt, krúnhjortakjøt og ymisk sløg av forrættum og dessertum.

Á veg út í bilin, hittu vit eitt av starvsfólkunum í Miðlahúsinum í túninum. Hesin bjóðaði okkum at støkka inn á gólvið í søguríka bygningin frá 17. øld í hjartanum í býnum. Her er blaðið Sosialurin og eisini útvarpsstøðin Rás2. Føroyingar eru eitt sera vinarligt fólk og stuttligir at vitja.

12. august fór bólkurin heimaftur til Íslands. Føroyingar hava avgjørt nakað at vísa fram fyri ferðafólki, vit kunnu so sanniliga viðmæla Føroyar sum ferðamannaland.

Starvsfólkini á Jarða í Ólavsvík.